Landssjúkrahúsið



# Kílaskurður av lívmóðurhálsinum

**Endamál**

Endamáli við skurðviðgerðini er at taka burtur kyknubroytingar í lívmóðurhálsinum.

**Hvat eru kyknubroytingar á lívmóðurhálsinum?**

Á lívmóðurhálsinum eru 4 stig av kyknubroytingum:

Lættar kyknubroytingar

Miðal sverar kyknubroytingar

Sverar kyknubroytingar

Carcinoma in situ broytingar

Kyknubroytingar koma eftir ein er smittaður við HPV-virus. Tað tekur ofta nógv ár, frá tí at ein er smittaður við HPV-virus, til man útviklar kyknubroytingar.

**Sjúkueyðkenni**

Oftast eru ongi eyðkenni. Kyknubroytingarnar verða staðfestar við kyknuroynd, sum verður tikin 3. hvørt ár hjá kommunulækna.

**Hvussu fer skurðviðgerðin fram**

Skurðviðgerðin fer fram í fullari doyving. Tí verður tú biðin um, at vera fastandi tá tú møtir. Tað merkir, einki eta ella drekka frá miðnátt dagin fyri skurðviðgerðina.

Eitt kegluformað petti av lívmóðurhálsinum verður skorið burtur og sent til kanningar, sjá mynd.
Tú fær skrivligt svar,  tá hettar fyriliggur.




**Aftaná skurðviðgerðina**
Tú kann eta og drekkað beinaveg eftir skurðviðgerðina. Tú kemur varisliga upp at sita, hettar fyri at tryggja at tú ikki bløðir meira enn vænta.

Eftir skurðviðgerðina bløðir tú nakað, hettar steðgar eftir fáum døgum. Aftaná tað, er vanligt við reyð/brúnt útflot upp til 3 vikur.

**Góð ráð**
Sárið á límóðurhálsinum lekist eftir 3-4 vikum. Hettar tíðarskeiðið verður frárátt at lyfta tungt, hørð fysisk venjing, fara í karbað, svimja, nýta tamponir og hava samlegu. Sári skal hava frið at lekja.
Aftaná 10-14 dagar dettur sárskorpan av, tá kann man vænta nakað av frískari bløðing.

Dagført: mars 2017

**Far til lækna**

- Um tú bløðir meira enn sum við vanliga menstruatión, ella sveitar
- Um tú fær sterka pínu
- Um tú fær fepur yvir 38*C

Eftir 2-3 vikur fær tú skrivligt svar uppá mikroskopisku kanningina, og eina ætlan fyri víðari framferð.

Landssjúkrahúsið

Gynokologiska deild tel 304500 ww.ls.fo